LM-063/2020

SAMBÝLIÐ Á MÝRINI

PROJEKTUPPSKOT - JULI 2020

INNIHALD

INNIHALD

1.0 SKIPAN

2.0 FRÁGREIÐING almennt

3.0 FRÁGREIÐING verkætlan

4.0 TEKNINGAR

5.0 TÍÐARÆTLAN

6.0 KOSTNAÐUR

1.0 SKIPAN

1.1 Byggiánari og byggiharri
1.2 Ráðgevarar
1.3 Formæli
1.4 Framhald

1.1 Byggiánari og byggiharri

Byggiánari:
Almannamálaráðið
Eiragarður 2
FO 100 Tórshavn
amr@amr.fo

Byggiharri/ráðgevi:
Landsverk
Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78
FO – 110 Tórsavn
lv@lv.fo

Bygginevnd:
Hallur Thomsen, formaður, Almannaverkið – Depilsstjóri
Kristjan Árnason, Almannamálaráðið, fulltrúi
Jeanette Blaasvær, Amannamálaráðið – fulltrúi
Elsa Klein Olsen, Almannaverkið, eindarleiðari

Verkætlanarleiðari:
Christian Djurhuus, Landsverk

Ráðgevi hjá bygginevnd:
Bárður í Baianstovu, saksarkitektur, Landsverk

1.0 SKIPAN

1.1 Byggiánari og byggiharri
1.2 Ráðgevarar
1.3 Formæli
1.4 Framhald

MAP
ARKITEKTAR

LBF Ráðgevandi verkfrøðingar

pbCONSULT
www.pbc.fo

1.2 Ráðgevarar

Arkitektur:
MAP arkitektar
Jónas Broncksgøta 5
FO 110 Tórshavn
Tlf. +298 55 19 00
map@map.fo

Konstruktións verkfr.
LBF ráðg. Verkfrøðingar
Niels Finsensgøta 10
Postsmoga 228
FO 110 Tórshavn
Tlf. +298 63 63 63
lbf@lbf.fo

HVS- og Ventilatións Verkfr.
PB Consult
R.C. Effersøesgøta 24
Postsmoga 1395
FO – 110 Tórshavn
Tlf. +298 30 82 00
pbc@pbc.fo

El verkfr.
LBF ráðg. Verkfrøðingar
Niels Finsensgøta 10
Postsmoga 228
FO 110 Tórshavn
Tlf. +298 63 63 63
lbf@lbf.fo

1.0 SKIPAN

1.1 Byggiánari og byggiharri
1.2 Ráðgevarar
1.3 Formæli
1.4 Framhald

1.3 Formæli

Projektuppskotið er eitt framhald av skipanaruppskotinum.

1.4 Framhald

Tá byggiharri hevur góðkent uppskotið, sum svarar til eitt "Projektforslag", verður uppskotið uppstyðja til eitt "Forprojekt" í samsvari við "Ydelsesbeskrivelser for Byggeri og Planlægning 2012"

2.0 FRÁGREIÐING alment

2.1 Byggiøkið / grundøkið
2.2 Uppmáting
2.3 Myndugleikar
2.4 Projektgransking



LBF: uppmáting av byggiøkinum - mynd 1

2.1 Byggiøkið / grundøki

Mtr.nr.	vídd m2
1au	2.883 m2

2.2 UPPMÁTING

LBF hevur gjørt uppmáting av byggiøkinum við Dronu og GPS tólum. Hendan uppmátingin saman við forritunum Infraworks og Civil hjá LBF, hava verið grundarlagið undir placering av bygninginum.
Økið kring matrikul 1au er mált inn við dronu í samband við skipanaruppskotið. Uppmátingin bleiv partvíst brúkt sum uppmáting og sum ein dagførd mynd av umráðunum og umstøðunum.

Í samband við prosjektuppskotið eru ískoytisuppmátingar framdar. Hesar uppmátingar eru framdar eftir at húsini eru niðurtikin og gevur eina meira fullfíggjaða uppmáting av umstøðunum.
Allar framdar uppmátingar liggja til grund fyri nøgdum og staðsetingum. Umframt uppmátingar eru graviroyndir gjørdar í økinum. Graviroyndirnar blivu framdar við 25 – 30 tons tungari gravimaskinu.
Í samband við graviroyndirnar blivu tvinni hol grivin. Grevstrarstøðini eru lýst sum GS1 og GS2, á mynd 1. Grevsturin staðfesti, at í grevstrarstaðið GS 1 var dýpið uml. 2 m, umleið kota 50.50 og dýpið við GS 2 var mált til umleið, 2 m, umleið kota 48,50.

2.3 MYNDUGLEIKAR

Byggiøkið er í Hoyvík í A1 øki. Fótprentið á sambýlinum er 865 m2 og lýkur kravið til byggistig (0,3). Tó verður neyðugt við serloyvi frá byggivaldinum tá talan ikki er um stakhús ella tvíhús, men eina størri eind sum er samanhangandi bygging, við fleiri íbúðum enn byggisamtyktin loyvir fyri hetta økið. Í ásetingunum fyri A1 økið í 3.grundumráði stendur at byggivaldið kann geva serloyvi til annað virksemi harímillum stovnar, sum natúrliga hoyra býlinginum til. Treytað av at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur.
Byggingin skal fylgja almennu byggisamtyktini og BK17

2.4 PROJEKTGRANSKING

Gransking av skipanaruppskotinum hevur til endamáls at tryggja at:

- krøvini/tørvurin hjá kundanum ið er staðfestur í byggiskránni og á møguligum fundum fram til dagin, tá ið arbeiðið við skipanaruppskotinum er sett í verk, eru yvirhildin - ella kunnu væntast at verða yvirhildin.
- avgerðir/niðurstøður/val, sum uppskotið fevnir um, eru í lagi við atliti at nýtslu og rakstri.
- arkitektoniski og parturin er greiður og at virkisnýtslan er fingin til heildar.
- fíggjarligu karmarnir væntandi halda so neyvt sum hetta nú kann gerast á hesum støði í projektinum.




DIAGRAM I skipan av virksemi




DIAGRAM II rørslumynstur

3.0 FRÁGREIÐING verkætlan

3.1 Arkitektur
3.2 Konstruktiónir
3.3 HVS, kloakk og ventilatión
3.4 EL

3.1 ARKITEKTUR

HUGSJÓN

Í Sambýlinum á Mýrini búgva fólk við lættari- og tyngri menningartarni og við ymiskum førleikum at klára seg sjálvi í dagligdegnum. Búfólk við lættari menningartarni búgva í sjálvstøðugu íbúðunum í eind 3. Búfólk við tyngri menningartarni búgva í búeind 1 og 2. Búfólk sum búgva á eind 1 og 2 hava ein størri tørv á nærveru og sambandi við onnur menniskju. Fyri at stuðla undir sosiala samveru er, í hesum sambýlinum, arbeitt við yvirgongdini frá tí privata bústaðnum og til tað almenna rúmið, sum er gongin og felagshølir úti og inni.
Somuleiðis er hædd tikin fyri at summi búfólk við aldrinum, vera rakt av demensi.
Dentur er lagdur á at Sambýlið tekur seg út sum ein vanlig bústaðarbygging. Sniðgevingin av bygninginum er einkul við fáum frábrigdum, eitt nú nýtulking av mønutaki og eini takterrassu við útsýnispalli. Tilfarsvalið úr timbri er ein kend tilfarsloysn til klæðing av bústøðum í Føroyum.

SKIPAN AV VIRKSEMI - diagram I

Bygningurin er í tveimum hæddum. Á veghædd eru tvær búeindir, eind 1 og eind 2. Felagshølir og starvsfólkahølir liggja á veghædd ímillum eind 1 og eind 2. Felagshølini fevna um eina tilhaldsstovu við atgong til úsýnisterrassu, eitt sansarúm og eitt vaskarí við atgongd til snóratræ í túninum.
Á ovaru hæddini er búeind 3, sum fevnir um íbúðir til búfólk ið klára at búgva í sjálvstøðugum íbúðum.

Matger
Køkurin í eind 1 verður útgjørdur til at búfólk kunnu gera sær morgunmat, millummála og nátturða.
Køkurin í eind 2 verður útgjørdur til at matgera til øll búfólk á sambýlinum. Døguramatur til Eind 1 verður borin í føtum og anrættaður í køkinum á Eind 1.
Køkar í Eind 3 eru útgjørdir til at búfólk kunnu matgera allar máltíðir. Tey búfólk í eind 3 sum ikki megna at gera mat sjálvi, hava møguleika fyri at eta saman við búfólkunum í eind 2.

RØRSLUMYNSTUR - diagram II


Ein grundleggjandi fyritreyt fyri at tú kanst kenna teg sum eitt sjálvstøðugt menniskja er, at tú hevur møguleika fyri at velja nær tú ynskir felagsskapin og nær tú ynskir at verða í einingi. Á sambýlinum er yvirgongdin frá tí almenna til tað privata, skipað í 3 sonur.
1. felags: Her hava øll búfólk og vitjandi atgong. Her kunnu búfólk frá øllum eindum hittast, antin við at luttaka í aktivitetum ella bara sita og eygleiða.
2. hálv privat: hetta er felagsøki hjá teimum búfólkunum sum búgva saman á eindini.

3.0 FRÁGREIÐING verkætlan

3.1 Arkitektur
3.2 Konstruktiónir
3.3 HVS, kloakk og ventilatión
3.4 EL



útsýnið yvir Eystnes og Stong



felags útitilhald - mynd frá Javna



dømi um nichu við inngongd til íbúð - *Seniorhuset i Hinnerup*

LÍVSGÓÐSKA ÚTI OG INNI
Meginreglan fyri einum góðum lívi er, at tú kennir teg tryggan, at tú fær ta hjálp tú hevur fyri neyðini og at tú ikki keðir teg. Tú skal hava møguleikan at velja nær tú ynskir at vera partur av felagsskapinum og nær tú ynskir at vera sjálv/ur.

ÚTILÍV
Í sambýlinum á Mýrini hava vit lagt felags úti-tilhaldsøkini í sambandi við høvuðsatkomu til bústaðin. Soleiðis at tað er lætt hjá tær at “detta” inn og vera við. Tú kanst luttaka í aktivitetinum ella bara sita og eygleiða.
Frá stovuni í felagsøkinum er atgongd út á terrassu við góðum útsýni yvir Nólsoyarfjørð, við Stong og Eystnesi í sjónarringinum.
Felags tilhald á takterrassu hevur góðan sólargang og gott útsýni yvir fjørðin.
Íbúðir á fyrstu hædd hava eina altan til privat útitilhald.
Allar íbúðir á veghædd hava beinleiðis atgongd út á egna terrassu, sum er títt privatútitilhald. Møguligt skal vera at girða terrassu inni við garði, um tørvur er á hesum.
Íbúðir móti suðri hava góðan sólargang og íbúðir móti norði hava gott útsýni.

INNILÍV
Búfólk sum búgva á eind 1 og 2, eru ikki eins sjálvstøðug og búfólk á eind 3 og hava tí ein størri tørv á nærveru og sambandi við onnur menniskju. Samstundis kann ein fylgja av menningartarninum vera, at tey hava trupult við at taka stig til at luttaka í felagsskapinum.
Í sambýlinum er arbeitt við ymsum innrættingarátøkum, sum gera tað møguligt hjá búfólkunum stigvíst at nærkast felagskapinum. Tað kann upplivast møtumikið hjá summum búfólkum at flyta seg frá íbúðini og út í felagsstovuna, har aktivitetur og nógv fólk eru.

Innrættingarátøk:

Torg
Tá tú trínur inn í Sambýlið frá høvuðsinngongdini, verður tú leidd/ur inn í eitt miðrúm. Frá miðrúminum hevur tú yvirlit yvir inngongd til Eind 1 og 2, til starvsfólkahølir og eisini til felagshølir, so sum vaskirúm, stovu og sansarúm. Miðrúmið er at kalla eitt alment innandura torg, har øll hava rætt til- og møguleika fyri at steðga á og seta seg. Fólk ganga til og frá og møguleikin fyri at fáa eitt prát er stórur. Torgið er ljóst og innbjóðandi, har eru innbygdir benkur og gott ljós frá einum Yvirljós í takinum

Tún
Við inngongd til íbúðina er ein nicha, sum er innrættað við einum bonki. Her hevur búfólki møguleika fyri at seta seg “út í tún” beint uttanfyri íbúðina.

Køksvindeyga
Eitt vindeyga í vegginum millum køk og gongd ger tað møguligt at síggja út í gangin frá íbúðini. Ella frá bonkinum í túninum, hava yvirlit yvir gang og íbúð samstundis.

3.0 FRÁGREIÐING verkætlan

3.1 Arkitektur
3.2 Konstruktiónir
3.3 HVS, kloakk og ventilatión
3.4 EL



sóldiagram

STAÐSETING
Heimið á Mýruni liggur á markinum millum vakra náttúru og tunga ferðslu. Góð lívd fæst frá flestu ættum, tó er opið í ein landnyrðing, hagani útsýnið er frítt yvir Eystnes og Stong.
Bygningurin er skipaður í tveimum hæddum, innast móti heygnum og í einari hædd uttast móti Hvítanesvegnum. Bygningsdisponeringin tekur á henda hátt hædd fyri, at grannabygningarnir ikki missa útsýnið.

SÓLARGANGUR
Sólargangurin er góður størsta partin av degnum. Morgunlýsið kann vera ómetaliga vakurt at síggja higani.

ATKOMA OG PARKERING
Við bili
Innkoyring til Sambýlið og Mýruvegin er frá Hvítanesvegnum. Parkeringsøkið við plássi til 24 bilar liggur millum Sambýlið og Hvítanesvegin. Parkeringsøkið verður lagt við grasarmering og ein runnur at verja móti larmi og partiklum, verður plantaður framvið Hvítanesvegnum. Innkoyring til parkeringsøkið er niðast á Mýruvegnum.

Til gongu
Gott bussamband er frá økinum. Bussteðgipláss er fáar metrar frá Sambýlinum.
Atkoma til Sambýlið er frá Mýruvegnum inn á eitt forpláss. Høvuðsinngongdin til Sambýlið er frá forplássinum. Forplássið skal vera bilfrítt, men av- og áseting við bili er møgulig.

Rampa
Ein gøta/rampa frá forplássinum fylgir lendinum, parallelt við gøtuna og leiðir til hædd 1 á vestara skjøldri, har inngongd er til Eind 3.
Sambýlið hevur ongan elevator.



Typa 1



Typa 2



Typa 3

3.0 FRÁGREIÐING verkætlan

3.1 Arkitektur
3.2 Konstruktiónir
3.3 HVS, kloakk og ventilatión
3.4 EL

PROJEKTUPPSKOP - JULI 2020

ÍBÚÐIR
Á Mýrini eru 3 ymiskar typur av sjálvstøðugum íbúðum

Typa 1
2 rúms íbúð
Støddd 55,7m2 brutto, íroknað 1/6 av gongsøkinum.
Íbúðirnar liggja á hædd 2 og hava altan, støddd: longd 1,5m og breidd 1,8m.
Íbúðin liggur í eind 3 sum eru sjálvstøðugar íbúðir.

Typa 2
1 rúms íbúð til serligt rørslutarn
Støddd 50,8 m2 brutto, íroknað 1/6 av gongsøkinum.
Íbúðin hevur beinleiðis atgongd til egið hátún 3,2m 1,5m
Í búðin er knýtt at felagskøki , í Eind 1 og 2

Typa 3
1 rúms íbúð
Støddd 42,7 m2 brutto, íroknað 1/6 av gongsøkinum.
Íbúðin hevur beinleiðis atgongd til egið hátún longd 3,2m og breidd 1,5m.
Íbúðin er knýtt at felagskøki, í Eind 1 og 2.

FERMETRAYVIRLIT

FERMETRABÝTI Á SAMBÝLINUM, BRUTTO

Búeind 1	325 m2
Búeind 2	359 m2
Búeind 3	326 m2
Felagseind	221 m2
Sambýlið samlað vídd:	1.231 m2
Skúrar 2x20m2	40 m2

FUNKTIÓNSKRØV
Ljóð
Bygningurin er bólkaður í ljóðklassa C.
Vatnrætt millum íbúðir, 55dB og trinljóð 53 dB.

Bruni
Brunaklassi 6, sum er hægsti klassi:
"Anvendelseskategori 6 omfatter bygningsafsnit til dagophold og eventuelt tillige til natophold, hvor de personer som opholder sig i bygningsafsnittet, ikke er i stand til ved egen hjælb at bringe sig i sikkerhed."

Atkoma
Yvirskipað verður roknað við at bygningsinnrættingar skulu lúka dygdarstøði C, sum svarar til krøv sett í BK17.
Tó eru ymsar innrættingar sum lúka krøvum sett til dygdarstøði B. Eitt nú hurðabreiddir í eind 1 og 2 og toilettinnrætting í typu 2 íbúðum.

3.0 FRÁGREIÐING verkætlan

3.1 Arkitektur
3.2 Konstruktiónir
3.3 HVS, kloakk og ventilatión
3.4 EL

BYGNINGSLUTIR

FUNKTIÓNSKRØV

Ljóð
Bygningurin er bólkaður í ljóðklassa C.
Vatnrætt millum íbúðir, 55dB og trinljóð 53 dB.

Bruni
Brunaklassi 6, sum er hægsti klassi:
"Anvendelseskategori 6 omfatter bygningsafsnit til dagophold og eventuelt tillige til natophold, hvor de personer som opholder sig i bygningsafsnittet, ikke er i stand til ved egen hjælp at bringe sig i sikkerhed."

Atkoma
Yvirskipað verður roknað við at bygningsinnrættingar skulu lúka dygdarstøði C, sum svarar til krøv sett í BK17.
Tó eru ymsar innrættingar sum lúka krøvum sett til dygdarstøði B. Eitt nú hurðabreiddir í eind 1 og 2 og toilettinnrætting í typu 2 íbúðum.

TAK
Dúkur verður lagdur á takið. Trýkantslistar verða lagdir á dúkin, fyri at skapa ein strukur.

ÚTVEGGIR
Klædningurin verður úr "thermowood" sum er hitaviðgjørt timbur. Hitaviðgjørt timbur hevur sera góðar eginleikar móti roti. Hitaviðgjørt timbur nýtist onga yvirflatuviðger og fær eina silvurlitta "patina" við tíðini.

GÓLV
Gólvbelegningur á felagsøkjum verður linoleum, gólv í íbúðum er úr timbri og gólv í toilettum og bað verður lagt við glíðtryggum gummibelegningi.

LOFT
Gipsloft í íbúðum og ljóðloft í gangum og felagsøkjum.

INNVEGGIR
Sum heild eru innveggir úr gipsi.
Í køkinum verður roknað við flísum har neyðugt verður við verju fyri mat- og vatn sprutti.
Í vesi-. og baðirúmi verður roknað við plátu sum tolir at veggir verða skolaðir.

ALTAN
Stálramma verður hongd á fasadu. Rekkverk verður úr hitaviðgjørdum timbri og altangólv verður úr terrassufjalum.

REKKVERK
Rekkverk á hátúni og rampu á hædd 2 verður úr hitaviðgjørdum timbri.

GOYMSLUSKÚRAR
Goymsluskúrurin verður úr timburkonstruktión og klæddur við hitaviðgjørdum timbri.

3.0 FRÁGREIÐING verkætlan

3.1 Arkitektur
3.2 Konstruktiónir
3.3 HVS, kloakk og ventilatión
3.4 EL

BYGNINGSLUTIR

UTTANUMSØKI

TÚN

Felagshátún á hædd 1:
Felagstún móti vestri og eystri verða løgd við betongflísum.
Felagshátún á hædd 2:
Felagshátúnið verður lagt við terrassufjalum og útsýnispallurin verður bygdur upp við timbri og klæddur við somu terrassufjalum.
Hátún til íbúðir:
Hvør íbúð á hædd 1 (veghædd) hevur eitt hátún sum er 3m x 1,5m.
Hátúnið verður lagt við terrassufjalum.

PARKERINGSØKI

Parkeringsøkið verður lagt við grasarmering.

GØTA

Gøta í skráanum móti vestri verður løgd við fínum skervi. Gøtan verður bygd í natúrliga skráan og har tað er neyðugt verður grótlaðing nýtt.

PLANTING

Vit skjóta upp at plantuvalið stimbrar sansirnar hjá búfólkunum og at bedini verða skipaði sum hábed, soleiðis at tað er lætt hjá búfólkunum at arbeiða við plantunum. At arbeiða í urtagarðinum er stimbrandi og meiningsfult virksemi sum samstundis eggjar búfólkunum til at koma út í fríska luft. Hábedini kunnu hava eitt bland av urtum, grønmeti og blómum .
Økið frammanfyri Sambýlið er góð staðseting til hábedini, her er góð lívd og góður sólargangur. Samstundis liggja hábedini nær felagstúninum og urtagarðsarbeiðið verður tá ein natúrligur partur av útitilhaldinum.

Framvið Mýrivegnum skjóta vit upp at planta berjarunnar. Berjarunnarnir kunnu bæði verða ein gestus til børnini í grannalagnum, men eisini verða nýtt til matna á sambýlinum.
Fyri at taka nakað av larminum og dálkanini frá ferðsluni, verða lágir runnar plantaðir framvið Hvítanesvegnum. Ansast má eftir at útsýnið ikki verður darvað.

Á økinum móti norði mæla vit til at planta eitt bland av leyv- og nálatrøðum. Trærøturnar drekka nakað av vætuni í økinum og kunnu hjálpa til við at halda økið turrari.

DJÓRAHALD

Økið móti norði liggur í lívd og kundi verið karmur um garð til húsdjór, eitt nú høsn. Á støðumyndini er víst dømi um staðseting av smærri bygningum til endamálið. Tó er hetta ikki partur av kostnaðarmetingini.

3.0 FRÁGREIÐING verkætlan

3.1 Arkitektur
3.2 Konstruktiónir
3.3 HVS, kloakk og ventilatión
3.4 EL

3.2 KONSTRUKTIÓNIR

LENDI

Økið har bygningurin er staðsettur er á sløttum lendi. Bygningur verður staðsettur í hæddini eftir verandi innkoyring Á Mýruni.
Í samband við graviroyndirnar blivu tvinni hol grivin.
Felags fyri bæði grevstrarstøðini er, at grevstrartilfarið var ein blandingur av leiri, mold og nakað av gróti í. Tilfarið verður ikki mett til at kunna vera brúkt sum ífylla fyri komandi bygningi. Tó skal havast í huga, at kemur man á tilfar av betri góðsku, og sum verður mett at vera egnað til ífyllu, verður tilfarið at leggja til síðis til seinri nýtslu, í samband við grevstrar og planeringsarbeiðið.
Hella er sjónlig ímóti markinum norður eftir á matriklinum so neyðugt verður at brekka/spreingja nakað av hellu burtur.
Eitt reinsiverk hjá Tórshavnar kommunu liggur undir lendinum har p-plássi er staðsett. Neyðugt verður at leggja betongplátu yvir fyri at verja reinsiverkið ímóti trýsti frá bilum.
Mett verður at neyðugt er at grava uml. 2 m undir verandi lendi undir bygningar/p-pláss. Áskotið, tó ikki mold, verður burturbeint og planerað verður upp við grótið. P-pláss verður fylt upp við gróti. p-plássið verður lagt við grasarmering.
Skráar verða gjørdir ímóti gøtuni vestan fyri matrikli. Við markið norðureftir, er nakað av hæddarmuni, í mesta lagi 1,7 m, sum verður loyst við stuðlamúri ella laðaðum grótgarði.

BERANDI KONSTRUKTIÓNIR

BYGNINGUR
Fundamentini verða úr staðstoyptum betongi. Berandi veggir verða primært úr timbur. Súlur verða úr límtræ ella úr stáli.

Bæði tann “longsgangandi” og tann “tvørgangandi” stabiliteturin verður sikraður við løttum veggum og møguliga við staðstoyptum betong. Bjálkarnir sum bera takið, verða límbjálkar eller stálbjálkar.
Konstruktiónirnar verða dimensioneraðar við støði í BK 17.

JARÐFRØÐILIG VIÐURSKIFTI

BYGGIBÚNING
Økið undir bygninginum skal tryggjast móti yvirflatuvatni ið kann væntast at renna omaná helluni, hetta verður gjørt við einum lagi av reint skotnum gróti undir fundamentum og lendisgólvi. Planera verður síðani við smærri gróti og skervi fyri at hava eitt gott støði at byggja á.
ATKOMUVEGUR OG PARKERINGSØKIÐ
Atkomuvegurin og parkeringsøkini verða dimensionerað smb. Hondbók 17 og 18 frá norska “statens vegvesen”.
Parkeringsøkinini taka støði í somu tilvísingum sum atkomuvegurin, við undantaki av tvørskurðinum.

Alt yvirflatuvatn frá vegi og parkeringsøki verður at samla upp og leiða til kommunalu leiðingarskipanina. Roknað er ikki við at brúk er fyri at gera frárenslugravir, við tað at talan er um ógvuliga lítlar skráar.

3.0 FRÁGREIÐING verkætlan

3.1 Arkitektur
3.2 Konstruktiónir
3.3 HVS, kloakk og ventilatión
3.4 EL

LASTIR
Lastirnar verða ásettar í samsvar við BK17 (DS/EN1990 ”Prosjekteringsgrundlag for bærende konstruktioner” og við DS/EN1991 ”Last på bærende konstruktioner”) við niðanfyri tilskilaðu tillagingum til føroysk viðurskifti og við serligum atliti til hesa bygging.

Stað [ ]	Flatulast [kN/m²]	Einkultkraft [kN]	Eurocode 1 Ávísing NA: 2013
Kategori A1, Boliger	1,5	2,0	6.3.1.2
Kategori B, kontor	2,5	2,5	6.3.1.2
Felagsrúm/uppihaldsøkið og gongir -Kategori C3	5,0	4,0	6.3.1.2
Trappur –Kategori B-C1	5,0	4,0	6.3.1.2
Terrassur	1,5/5,0	2,0/4,0	6.3.1.2 Note 1 NA
Tak –Kategori H	0,0	1,5	6.3.4.2

NÝTSLULASTIR
Samsvarandi ásetingunum í DS/EN1991 DK NA skulu økir dimensionerast fyri hesar nýtslulastir:

VINDUR
Bygningurin verður kannaður fyri eina 2 sekundshvivlu upp á 50 m/s. Festi og berandi konstruktiónir í útveggjum og tekjum verða dimensioneraðar fyri eina 2 sekundshvirlu upp á 50 m/s.

KAVI
Grundstøddin fyri lendisvirði á kavalastini er: sk,0 = 1,0 kN/m2. Kavalastin verður fastsett samsvarandi BK17 (DS/EN1991-1-3).

AÐRAR LASTIR
Aðrar lastir, sum t.d. frá arkivi og tyngri tólum ella installatiónum, verða bert tiknar við, um nøktandi upplýsingar um hesar verða latnar av byggharra, arkitekti ella installatións-verkfrøðingi.

DEFORMATIÓNIR
Vanliga verða krøvini í BK17 fylgd, men í ávísum førum bera atlit til útsjónd, verju móti lekum, ella ávísar bygningslutir, sum t.d. hurðar og glasveggir, í sær strangari krøv.

DEFORMATIÓNIR
Vanliga verða krøvini í BK17 fylgd, men í ávísum førum bera atlit til útsjónd, verju móti lekum, ella ávísar bygningslutir, sum t.d. hurðar og glasveggir, í sær strangari krøv.

3.0 FRÁGREIÐING verkætlan

3.1 Arkitektur
3.2 Konstruktiónir
3.3 HVS, kloakk og ventilatión
3.4 EL

Ljóðteknisk krøv
Bjálvað verður móti óljóði uttanífrá og millum einstøku rúmini samsvarandi ásetingunum í FBR17 fyri undirvísingarbygningar og/ella eftir vegleiðingunum í SBI-Anvisning 216. Har innrættingin er opin ber tó ikki til at uppfylla krøvini til fullnar.

Brunatekninsk krøv
Brunavernd og brunatrygd skulu lúka krøvini, sum sett eru til slíka bygging í FBR17 og í "Reglugerð fyri brundaverju og brunatrygd".

FYLLA UNDIR BYGNINGI
Byggiøkið er planerað við knústum tilfari. Bygningurin verður settur í hædd soleiðis, at økið verður brúkt sum best gjørligt. Oman á grótfylluna verður eitt avrættingar- og kappilarbrótandi lag av reinum skervi lagt út til at tryggja gott dren undir bygninginum.

BERANDI SKIPAN TIL UPPTØKU AV LODDRØTTUM LASTUM.
Tekjan verður úr sperrum av timbur omaná sperrurnar verða krosfinér, bjálving og takdúkur fest.
Lastin frá tekjuni og dekk verður førd til veggir ella í ávísum førum til súlur og síðani niður í fundamentini.
Fundamentini verða gjørd úr staðstoyptum betongi. Øll fundamentini verða sett á fyllu.

BERANDI SKIPAN TIL UPPTØKU AV VATNRØTTUM LASTUM.
Til upptøku av vatnrøttum lastum, so sum vindlast og seismisk last, verður dekkið millum hæddirnar og takkonstruktiónina gjørd sum ein skiva. Skivan førur so lastina yvir til tey elementini sum kunnu føra lastina niður til fundamentini.

3.0 FRÁGREIÐING verkætlan

3.1 Arkitektur
3.2 Konstruktiónir
3.3 HVS, kloakk og ventilatión
3.4 EL

3.3 HVS, KLOAKK OG VENTILATIÓN

3.31 LEIÐINGAR Í LENDI

Á økinum har ið sambýli skal byggjast kann roknast við at drenvatn skal leiðast runt um bygningin.
Regnvatnsleiðingar frá takvatnsbrunnum, ristum v.m. kunnu leiðast í kommunala regnvatnsleiðing.
Ein nøkandi rottangi skal dimensjonerast til frárensl frá vesum, hondvøskum v.m. Kloakkeiðingar í jørð eru evnaðar úr Ultra PP, SN8. Skal bindast í verandi kommunala rottanga á parkeringsplássinum. Stoypt verður ein betong pláta oman á rottangan.
Nýggja kloakkleiðingin verður bundin í verandi kloakk leiðing.
Útlufting frá leiðingum verður førd yvir tak.
Frárenningarleiðingar verða dimensioneraðir eftir Dansk Standard 432.
Feittútskiljari verður dimensjoneraður til tørvin.
Til vatnveiting inn í bygninginum verður løgd ø75 mm PE-leiðing frá kommunalu vatnveitingini. Leiðingin verður førd oman gjøgnum lendi og inn í tøknirúm.

Sanitetsarbeiði:
Frárenningarleiðingar:
Allar sanitetseindir verða íbundnar í muffur á kloakkleiðingum við lendisgólv. Uppsettar verða reinsilúkur á rør beint omanfyri lendisgólv.
Útluftingar frá møguligum fallstammum verða førdar yvir tak.
Brúksvatnsleiðingar:
Ringrásskipanin til tað heita vatnið verður gjørd soleiðis, at hitin ongastaðni er avkøldur meiri enn uml. 5oC í høvuðsleiðingunum og at vatnið er frammi við tappstøðini innanfyri 10 sekund, eftir at skrúvað er frá. Uppsettir verða hitastýrdir ventilar við enda á heittvatnsleiðingum, sum opna um hitin í leiðingunum fellur.
Brunaskáp:
Uppsett verða vatnfyltir slanguvindarar, sum fabr. NOHA, við 30 m ¾” slangu. Slanguvindarar verða uppsettir eftir ávísing í góðkendum brunaplani.

3.32 HITAVERK

Í tøknirúminum verður uppsett ein Jarðhita pumpuskipan ið verður íbundin hita og brúksvatn.
Roknast kann við 4 jarðhita holum. Rúmini í nýggja sambýlinum verða upphitaði við gólvhita.
Frá tøknirúmi verða lagdar hitaverksleiðingar til fordeilaraskáp á lendis- og 1. hædd. Úr skápum verða løgd gólvhita slangur til øll rúm í bygninginum. Hitin verður stillaður við rúmfølara í einstøku hølunum. Longd á sloyfum til gólvhita verður ongastaðni longri enn 85 m. Og slangurnar verða samlaðar í fordeilaraskápum, við telestatum á returum.
Framrenningarhitin kann verður stýrdur eftir uttandura hitanum og hitatørvinum í bygninginum. Uppsett verður uttandura følari.
Allar pumpur verða tørvstýrdar og bundnar í stýriskipan.
Hitaverksleiðingar:
Høvuðleiðingar eru sum svørt jarnrør ella alupex.
Har leiðingar verða førdar ígjøgnum skilaveggir, verða uppsettir Karfa-búsningar.

3.0 FRÁGREIÐING verkætlan

3.1 Arkitektur
3.2 Konstruktiónir
3.3 HVS, kloakk og ventilatión
3.4 EL

Leiðingarnar verða lagdar, soleiðis at ekspansión kann upptakast í rørskipanini.

Gólvhitaslangur eru PEX-rør við ilt-verju.
Hita rúmfølarar eru í øllum rúmum.
Gólvhitaskáp verða staðsett í veggir hóskandi støð í bygninginum.
Umráðandi er, at hita- og brúksvatnrør verða “potentiale” útlíknað í elarbeiðstøkuni.
Innregulering:
Uppsettir verða innreguleringsventilar, so lætt er at innregulera skipanina, og tryggast kann, at dimensioneraða vatnnøgdin kemur til øll rúm. Innreguleringsventilar eru sum fabr. TA, typa STA. Innreguleringin fer fram við CBI-innreguleringstóli.
Hitaverkið verður dimensionerað eftir DS 469. Hitatørvurin eftir DS 428.
Bjálving:
Allar hitaverksleiðingar verða bjálvaðar eftir DS-452, bjálvingarklassi 3 og 4.
Í tøknirúmi verða leiðingarnar bjálvaðar við Rockwool Unversalskálum við alufolie. Hereftir verða leiðingarnar klæddar við kløtzellørifti, sum verður smurt tvær ferðir við límvatni og síðani málað ella klæddar við plast. Á allar leiðingar í tøknirúmum verða merkir og pílar settir á vísandi til streymrætning.
Leiðingar, sum liggja í skaktum og omanfyri niðurhongd loft, verða bjálvaðar við Rockwool Universalskálum.
Allir ventilar verða veittir við bjálvingarkappa.

3.33 VENTILATIÓN

Fyriskipanir
Ventilasjónsskipanin verður gjørd sambært lógum, reglugerðum, standardum, vegleiðing-um og kunngerðum, ið er galdandi fyri hetta arbeiði.
DS 428, “DIF’s norm for brandtekniske foranstaltninger ved ventilationssystemer”,
DS 447, “DIF’s norm for ventilationsanlæg”
DS 468, ”DIF’s norm for ”Automatiske reguleringssystemer til VVS-tekniske anlæg”,
Og annars sambært vegleiðingum frá veitarum vm.
Komfortventilasjón:
Ventilatiónsverk verður sett upp í tøknirúm og takrúm á loftshædd. Tey flestu rúmini verða ventileraði við innblásing og útsúgving. Inntak- og Avkasts-ristir lagdar í útvegg á tøknirúmum. Víst verður til BK17 um krav til luftskifti í rúmum. Í hølum har nógv fólk kunnu møtast verður luftnøgdin tørvstýrd.
Rúm
Køksventilasjón:
Eymhettur eru ikki við í hesari arbeiðstøku, men verða veittar av øðrum arbeiðstakara. Kanalir v.m. frá eymhettum og yvir tak ella útvegg, eru við í hesari arbeiðstøku. Møguligt er at binda útsúgving frá eymhettum til komfortventilasjónina, ella at tær verða veittar við motori við avkast út í vegg.
Útsúgving frá eymhettum verður stýrd við on/off knøttum.
Kontrollventilasjón:
Kontrollventilasjónin er partur av komfortventilasjónini.

3.0 FRÁGREIÐING verkætlan

3.1 Arkitektur
3.2 Konstruktiónir
3.3 HVS, kloakk og ventilatión
3.4 EL

Brunaskipan:
Uppset verður ein sentral stýriskipan í tøknirúm til brunaspjell og følarar.
Tal av brunaspjellum verða endaliga ásett, tá brunaplanur er góðkendur.

3.34 CTS-SKIPAN
Uppsett verður fullfíggjað stýrings- og stillingsútgerð til allar hita-, heittvatn- og ventilatións- og brunaskipan. Føringsvegir verða samskipaðir við el arbeiðstøkuna.
Skipanin verður uppsett á hóskandi stað og allir føringsvegir verða samskipaðir við el-arbeiðstøkuna.
DS 468, ”DIF’s norm for ”Automatiske reguleringssystemer til VVS-tekniske anlæg”,
DIF norm fyri Veikstreymsintallasjónir, DS460 og SBI-anvísingar til stýringsútgerð.

3.0 FRÁGREIÐING verkætlan

3.1 Arkitektur
3.2 Konstruktiónir og tilfar
3.3 HVS, kloakk og ventilatión
3.4 EL

3.41 Sterkstreymur
Tilfar:
Kaðalar verða gjørdar úr PVC- og halogenfríum tilfarið. Innleggingar tilfarið verður LK OPUS ella líknandi dygd.

Høvuðsveiting – grupputalvur og stikkleiðingar:
Ein høvuðstalva verður sett í tøknirúm mitt í bygninginum. Hendan høvuðstalvan, við streymmátara, verður streymveitt frá SEV skápi, nærhendis bygningin.
Høvuðstalvan verður plátukapslað á gólvsokli, og staðsett soleiðis, at tað ber til at vaksa um hana um neyðugt.
Talvan verður veitt við inngangsfelti og avbrótara, plássi til SEV kWh-mátara við tilhoyrandi streymtransformarum, feilstreym- og bólkaavbrótarum/verjum, stýringum, kaðalfeltum og jørðskinnarum skeltum, bóklingi við tekningum, diagrammum og øðrum viðkomandi upplýsingum og frágreiðingum og tøkum plássi, sum fyriskrivað í byggiskránni.
Skipanir, so sum ventilatiónsskipanir, stórkøkur og ljósskipanir úti, verða veittar úr høvuðstalvuni.
Roknað verður ikki við no-break ella short-break veitingum.
El-innleggingin verður annars gjørd sum ein trýfasa TT-skipan.

Jørð/potentialútlíkning:
Í bygninginum verður gjørd ein jørðjavningarskipan, samsvarandi krøvum í Sterkstreymsreglugerðini. Skipanin verður gjørd við tveimum elektrodum. Onnur til verjujørð, og hin driftsjørðin, tøk til skipanir ið krevja sjálvstøðuga driftsjørð.
Í bygninginum verður lagdur ein blankur 1×25mm² Cu-jørðleiðari, við einari passandi nøgd av jørðjavningar skinnarum (plintum) ámonteraðum. Hesin jørðleiðarin verður t.d. lagdur eftir kaðalstigum úr leiðandi tilfari. El-føringsvegir úr leiðandi tilfari, metallutir ið koma inn í bygningin, HVS- og ventilatiónsskipanir, gjøgnumgangandi bygningslutir úr metali og armering í lættbetongi, betongi og pussi, verður bundi í hesar jørðjavningar skinnararnar.
Allir sterkstreymskaðalar, uttan stikkleiðingskaðalin, verða veittir við jørðleiðarum, ið verða íbundnir jørðklemmur. Kaðlar, sum verða lagdir frá talvunum, verða bundnir í jørðskinnaran í talvuni teir verða lagdir frá.

3.0 FRÁGREIÐING verkætlan

3.1 Arkitektur
3.2 Konstruktiónir og tilfar
3.3 HVS, kloakk og ventilatión
3.4 EL

Føringsvegir:
Kaðalføringsvegir til el-innleggingarnar verða skipaðir við innleggingarrennum og kaðalstigum í bygninginum og við rørum í lendinum.
Yvir niðurhongdu loftunum í gongsøkjunum, verða uppsettir kaðalstigar, ið koma at virka sum ein samanhangandi høvuðsføringsvegur gjøgnum bygningin. Stigin verður soleiðis, at kaðlar til ávikavist sterkstreym, veikstreym, net og maskinútbúnað, kunnu liggja hvør sær.
Føringsvegirnir verða dimensioneraðir soleiðis, at tað verður nakað av tøkum plássi í teimum, eftir at innleggingin er liðug.
Allar gjøgnumføringar í veggir og dekk, ið verða gjørdar til el-innleggingarnar, verða tettar mótvegis bruna, ljóð og vætu.

Ljósinnleggingar:
Tendringar og doyvingar v.m., verða fyri ein part intelligentar við ávikavist manuellum tendringum, rørslufølarum og ljósfølarum. Í kømurinum og felagsøkjum verða uppsettar Dagljósstýringar, ið tryggja at ljósið bert brennur tá tørvur er á hesum. Møguleiki verður at yvirstýra hesar dagljósstýringarnar. Stýringar og ljósarmaturini skulu vera við døgnrytmuljós Har tørvur verður mettur at verða á tí, verður ljósið gjørt soleiðis, at tað kann doyvast.
Vald verða armatur og lampur við høgari belýsningsvirkningsgrad og orkusparandi ljóskeldum við høgum Ra-index. Sløg, góðska og formar á armaturum og lampum, verða vald eftir nýtsluni av teimum ymisku rúmunum, umhvørvinum og hvussu hesi draga fram nakrar av teimum byggilistarligu loysnunum. Yvirhøvur verða ljósarmatur, lampur og pendlar í bygninginum við LED-ljóskeldum.
Neyð- og panikkljós verða samsvarandi brunastrategiðini fyri bygningin. Neyðstreymur til hesi ljósini verður veittur frá battaríðum úti í armaturunum.

Kraftinnleggingar:
Í bygninginum verður uppsett ein passandi nøgd av vanligum stikkkontaktum, 230V. Herundir reingerðarstikkkontaktir, ið verða uppsettar soleiðis at í størri rúmum er fjarstøðan millum hvørjar tvær reingerðarstikkontaktir ikki er størri enn 10 metrar. Í búrúmum verður nøgdin á stikkontaktum samsvarandi krøvum til sethús. Um Landsverk hava serstakar ásetingar til nøgd og slag av stikkontaktum við arbeiðspláss/skrivstovupláss verða hesar fylgdar.
Í tøknirúmum og á øðrum hóskandi støðum, verða tað umframt vanligar 230V-stikkkontaktir, eisini uppsettar tekniskar stikkkontaktir, 3×400V.
Umframt tøku stikkontaktirnar, verður kraft løgd til alla leysa- og fasta útgerð og tól, so sum hvítvørur, køkstól og venjingarmaskinum sum tær á Virkni.
Kraftveitingar verða lagdar til tær skipanirnar sum verða í bygninginum. Herundir hitaskipan og ventilatiónsskipanir. Veitingarkaðalarnir til tær størru skipanirnar enda í trygdaravbrótarum, sum verður markamótið millum el- og HVS-innleggingarnar. Tvs. markamót mótvegis skipanartalvum og stýrikassum við eftirfylgjandi kaðalum og lutum.

3.0 FRÁGREIÐING verkætlan

3.1 Arkitektur
3.2 Konstruktiónir og tilfar
3.3 HVS, kloakk og ventilatión
3.4 EL

3.42 VEIKSTREYMUR

Telefon og internet:
Veitt verður eitt dátunet við fastnetstikkum við arbeiðsstøðir, routarar, maskinur, skipanir og hvat annars krevur fastnet samband. Kervi verður á CAT6a-støði og roynt í mun til 250Mb-ferð, við hartil egnaðum mátitólum.
Í stórum umfatar netið tvær stikkleiðingar frá FT-Net, X-felt rackskáp við tilhoyrandi útgerð og UTP-stikk runt um í bygninginum, við koparsambondum til X-feltið.
X-feltskápið verður plasera soleiðis at rúmið tað verðir í, kann læsast fyri óviðkomandi.
Roknast verður ikki við at arbeiðstøkan fevnir um aktiva útgerð.


Brunaávaring:
Í bygninginum verður uppsett ein ABA-skipan, umframt ABDL-skipanir á tær hurðarnar sum krevja tað.
Við miðstøð (sentralur), brunavarnarum (brandmeldarum), brunatrýstum, lúrum og sjálvvirkandi afturlatingarhurðum (ABDL) o.ø., verður skipanin gjørd samsvarandi krøvum í brunastrategiðini fyri bygningin, og soleiðis at hon verður myndugleikagóðkend.
Frá miðstøðini verður telefonsamband við eitt nú Ansni.


4.0 TEKNINGAR - ARKITEKTUR

4.1 TEKNINGAR - HVS,VENT

4.2 TEKNINGAR - EL










Leyv- og nálatrø
kt.53
kt.53
kt.54
grasfløta
tak yvir snór
kt.54
tún kt.53,30
kt.53
grasfløta
kt.52
Grasarmering
kt.52,30
lágur runnavøkstur
p.plass 23 stk
bilastøðil rørslutarn
útsýnispallur
kt.56,85
glashálvtak
Eind 1 og 3
Eind 2
høsnagarður
kt.54
kt.55
kt.56
kt.57
rampa
hábed til grønmeti, urtir og blómur
tún kt.53,30
hábed til grønmeti, urtir og blómur
gøta
rusk
goymsla-súkklur
berjarunnar
berjarunnar
kt.57
kt.56
kt.55
kt.54
kt.53
Á MÝRINI
kt.52
HVÍTANESVEGUR


PROSKJAL 09 OKTOBER 2020
Móttikið 30. september 2019



Projektstig: Forprojekt

4033 - Sambýlið á Mýrini LANDSVERK byggir land	Heiti: 0. Veghædd - Mát	Tekning nr.: A-1-0-MA-001
		Mát: 1 : 200
		Dagfest: 08.09.2020 Pappírst.: A3
		Broytt:
	Undirráðgevarir:	Tlf + 298 551900 map@map.fo www.map.fo MAP ARKITEKTAR


PROSKJAL NR 10 DES 2019



Projektstig: Projektuppskot

4033 - Sambýlið á Mýrini LANDSVERK byggir land	Heiti: 1. Hædd - Mát	Tekning nr.: A-1-1-MA-001 Mát: 1 : 200 Dagfest: 17.07.2020 Pappírst.: A3 Broytt:
	Undirráðgevarir:	Tlf + 298 551900 map@map.fo www.map.fo MAP ARKITEKTAR


PROSKJAL NR. 19/2020 - 2. september 2019



Projektstig: Forprojekt

4033 - Sambýlið á Mýrini LANDSVERK byggir land	Heiti: 0. Veghædd - Innrætting	Tekning nr.: A-1-0-IN-001 Mát: 1 : 200 Dagfest: 08.09.2020 Pappírst.: A3 Broytt:
	Undirráðgevarir:	Tlf + 298 551900 map@map.fo www.map.fo MAP ARKITEKTAR


PROSKJAL NR. 063/2020 - 20. november 2019



Projektstig: Projektuppskot

4033 - Sambýlið á Mýrini LANDSVERK byggir land	Heiti: I. Hædd - Flatmynd	Tekning nr.: A-1-1-ET-001 Mát: 1 : 200 Dagfest: 17.07.2020 Pappírst.: A3 Broytt:
	Undirráðgevarir:	Tlf + 298 551900 map@map.fo www.map.fo MAP ARKITEKTAR


PROSKJAL VIÐ BSI 20 September 2019



Projektstig: Projektuppskot

4033 - Sambýlið á Mýrini LANDSVERK byggir land	Heiti: Longdarskurður D-D	Tekning nr.: A-X-3-DD-001 Mát: 1 : 200 Dagfest: 17.07.2020 Pappírst.: A3 Broytt:
	Undirráðgevarir:	Tlf + 298 551900 map@map.fo www.map.fo MAP ARKITEKTAR


PROSKJAL SAMÞYKKT 20. desemberr 2019



Projektstig: Projektuppskot

4033 - Sambýlið á Mýrini LANDSVERK byggir land	Heiti: Tvørskurður A-A	Tekning nr.: A-X-3-AA-001 Mát: 1 : 100 Dagfest: 17.07.2020 Pappírst.: A3 Broytt:
	Undirráðgevarir:	Tlf + 298 551900 map@map.fo www.map.fo MAP ARKITEKTAR


PROSKJAL VARSLOPSKOÐI - 2019



Projektstig: Projektuppskot

4033 - Sambýlið á Mýrini LANDSVERK byggir land	Heiti: Tvørskurður B-B	Tekning nr.: A-X-3-BB-001
		Mát: 1 : 100
		Dagfest: 17.07.2020 Pappírst.: A3
		Broytt:
	Undirráðgevarir:	Tlf + 298 551900 map@map.fo www.map.fo MAP ARKITEKTAR

PROJEKTUPPSKOP - JULI 2020



Projektstig: Projektuppskot

4033 - Sambýlið á Mýrini LANDSVERK byggir land	Heiti: Tvørskurður C-C	Tekning nr.: A-X-3-CC-001 Mát: 1 : 100 Dagfest: 17.07.2020 Pappírst.: A3 Broytt:
	Undirráðgevarir:	Tlf + 298 551900 map@map.fo www.map.fo MAP ARKITEKTAR



Framsíða móti suðri


Framsíða móti eystri



Framsíða móti norðri

Framsíða móti vestri


PROSKJAL NR 1 DAGSETT 17. september 2019




(23) Hæddarskilnaður

1 : 5

Hall á terassu 1:40







Projektstig: Projektuppskot

4033 - Sambýlið á Mýrini LANDSVERK byggir land	Heiti: Normalskurðir - Hæddarskilnaður	Tekning nr.: F-X-8-DE-002 Mát: 1 : 5 Dagfest: 17.07.2020 Pappírst.: A3 Broytt:
	Undirráðgevarir:	Tlf + 298 551900 map@map.fo www.map.fo MAP ARKITEKTAR

Lendisdekk U-virði 0,10:
120mm Betongdekk við gólvhita
350mm polysteren (Lambda 0,35)



(13) Lendisgólv
1 : 5




(27) Kalt tak
1 : 5

Projektstig: Projektuppskot

4033 - Sambýlið á Mýrini LANDSVERK byggir land	Heiti: Normalskurðir - Lendisgólv og tak	Tekning nr.: F-X-8-DE-003 Mát: 1 : 5 Dagfest: 17.07.2020 Pappírst.: A3 Broytt:
	Undirráðgevarir:	Tlf + 298 551900 map@map.fo www.map.fo MAP ARKITEKTAR


Berandi skilaveggur:
2x13mm gips
45x95mm stólpar, pr 600mm
70mm bjálving
50mm luftlag
70mm bjálving
45x95mm stólpar, pr 600mm
2x13mm gips




Skilaveggur 1:
2x13mm gips
45x95mm stólpar, pr 600mm
95mm bjálving
2x13mm gips

Skilaveggur 2:
2x13mm gips
45x120mm stólpar, pr 600mm
120mm bjálving
2x13mm gips

Skilaveggur 3:
2x13mm gips
45x145mm stólpar, pr 600mm
145mm bjálving
2x13mm gips



(22) Inniveggur
1 : 5



(21) Útveggur
1 : 5

Projektstig: Projektuppskot

4033 - Sambýlið á Mýrini LANDSVERK byggir land	Heiti: Normalskurðir - Veggir	Tekning nr.: F-X-8-DE-001 Mát: 1 : 5 Dagfest: 17.07.2020 Pappírst.: A3 Broytt:
	Undirráðgevarir:	Tlf + 298 551900 map@map.fo www.map.fo MAP ARKITEKTAR

PROJEKTUPPSKOP - JULI 2020

4.0 TEKNINGAR - ARKITEKTUR

4.1 TEKNINGAR - HVS,VENT

4.2 TEKNINGAR - EL



Teknlýsing:

- Skittvatn leiðing (min 20‰)
- Regnvatn leiðing (min 15‰)
- Dren leiðing (min 5‰)
- Feittútskiljara leiðing


Broytt:

C O N S U L T
RÁÐGEVANDI VERKFRØÐINGAR F.R.I.

R. C. Effersøesgøta 24
boks 1395
fo-110 Tórshavn
tel: 308200
fax: 308201
e-mail: pbc@pbc.fo
www.pbc.fo

Heiti:	Sambýlið á Mýruni	Dagfest:	17.07.2020
	Projektuppskot	Mál:	19-10
	Støðumynd	Mát:	1 : 250
Teknað:	JF Kannað: PH	Tekn. nr.:	K08_V(50)_H1_E0_001

Útskrivað: 17-07-2020 11:28:38
Leinkja: I:\2019 - Projektir\19-10 - Sambýlið á Mýruni\07. Tekningar\PB Consult\02. Projektuppskot\PBC_Sambýli á Mýruni_Projektuppskot.rvt



Teknlýsing:


Skittvatn leiðing (min 20‰)

Broytt:

C O N S U L T
RÁÐGEVANDI VERKFRØÐINGAR F.R.I.

R. C. Effersøesgøta 24
boks 1395
fo-110 Tórshavn
tel: 308200
fax: 308201
e-mail: pbc@pbc.fo
www.pbc.fo

Heiti:	Sambýlið á Mýruni Projektuppskot Frárenning, lendishædd	Dagfest:	17.07.2020
		Mál:	19-10
		Mát:	As indicated
Teknað:	JF	Kannað: PH	Tekn. nr.: K08_V(52)_H1_E0_100



Teknlýsing:

- Hiti fram
- Hiti aftur
- Brúksvatn kalt
- Brúksvatn heitt
- Brúksvatn ringrás

Broytt:

CONSULT
RÁÐGEVANDI VERKFRØÐINGAR F.R.I.

R. C. Effersøesgøta 24
boks 1395
fo-110 Tórshavn
tel: 308200
fax: 308201
e-mail: pbc@pbc.fo
www.pbc.fo

Heiti:	Sambýlið á Mýruni Projektuppskot Brúksvatn, lendishædd	Dagfest:	17.07.2020
		Mál:	19-10
		Mát:	1 : 200
Teknað:	JF	Kannað: PH	Tekn. nr.: K08_V(53)_H1_E0_100



Teknlýsing:


Gólvhiti
Fordeilaraskáp

Broytt:

C O N S U L T
RÁÐGEVANDI VERKFRØÐINGAR F.R.I.

R. C. Effersøesgøta 24
boks 1395
fo-110 Tórshavn
tel: 308200
fax: 308201
e-mail: pbc@pbc.fo
www.pbc.fo

Heiti:	Sambýlið á Mýruni	Dagfest:	17.07.2020
	Projektuppskot	Mál:	19-10
	Hitaverk, gólvhiti, lendishædd	Mát:	1 : 200
Teknað:	JF	Kannað: PH	Tekn. nr.: K08_V(56)_H1_E0_100



Teknlýsing:

Gólvhiti
Fordeilaraskáp

Broytt:

C O N S U L T
RÁÐGEVANDI VERKFRØÐINGAR F.R.I.


R. C. Effersøesgøta 24
boks 1395
fo-110 Tórshavn
tel: 308200
fax: 308201
e-mail: pbc@pbc.fo
www.pbc.fo


Heiti: Sambýlið á Mýruni
Projektuppskot
Hitaverk, gólvhiti, 1.hædd

Dagfest: 17.07.2020
Mál: 19-10
Mát: 1 : 200

Teknað: Kannað:

Tekn. nr.: K08_V(56)_H1_E1_200





Broytt:

C O N S U L T
RÁÐGEVANDI VERKFRØÐINGAR F.R.I.


R. C. Effersøesgøta 24
boks 1395
fo-110 Tórshavn
tel: 308200
fax: 308201
e-mail: pbc@pbc.fo
www.pbc.fo

Heiti: Sambýlið á Mýruni
Projektuppskot
Tvørskurður princip

Dagfest: 17.07.2020
Mál: 19-10
Mát: 1 : 150

Teknað: JF Kannað: PH

Tekn. nr.: K08_V(59)_H1_EX_100



Teknlýsing:

- VI — Innblásing
- VU — Útsúgving
- IN — Inntak
- AV — Avkast

Ventilatiónsverkið / Ventilator

VE01	Sum Swegon RX20
VE02	Sum Exhausto VEX160

Broytt:

pbc CONSULT
RÁÐGEVANDI VERKFRØÐINGAR F.R.I.


R. C. Effersøesgøta 24
boks 1395
fo-110 Tórshavn
tel: 308200
fax: 308201
e-mail: pbc@pbc.fo
www.pbc.fo

Heiti: Sambýlið á Mýruni
Projektuppskot
Ventilatión, lendishædd

Dagfest: 17.07.2020
Mál: 19-10
Mát: 1 : 200

Teknað: JF Kannað: PH

Tekn. nr.: K08_V(57)_H1_E0_100



Broytt:

C O N S U L T
RÁÐGEVANDI VERKFRØÐINGAR F.R.I.


R. C. Effersøesgøta 24
boks 1395
fo-110 Tórshavn
tel: 308200
fax: 308201
e-mail: pbc@pbc.fo
www.pbc.fo

Heiti: Sambýlið á Mýruni
Projektuppskot
Ventilatión, diagram

Dagfest: 17.07.2020
Mál: 19-10
Mát:

Teknað: JF Kannað: PH

Tekn. nr.: K08_V(57)_H1_EX_100



Broytt:

C O N S U L T
RÁÐGEVANDI VERKFRØÐINGAR F.R.I.


R. C. Effersøesgøta 24
boks 1395
fo-110 Tórshavn
tel: 308200
fax: 308201
e-mail: pbc@pbc.fo
www.pbc.fo

Heiti:	Sambýlið á Mýruni Projektuppskot Tøknirúm	Dagfest:	17.07.2020
		Mál:	19-10
		Mát:	1 : 25
Teknað:	JF	Kannað: PH	Tekn. nr.: K08_V(59)_H1_EX_103

4.0 TEKNINGAR - ARKITEKTUR

4.1 TEKNINGAR - HVS,VENT

4.2 TEKNINGAR - EL



PROJEKTUPPSKOT

Litra:		Dagfest:	Teknað:	Kannað: Góðkent:
		2020-07-16	ia	EPA

Mál: Sambýlið á Mýrini

Arbeiðsánari: MAP Arkitektar Sp/f


Evni: Føringsvegir
Uppskot

Tekning nr.:	N01	Litra:
Mál nr.:	1965	
Mát:	1:200	

5.0 TÍÐARÆTLAN

5410 Sambýli til menningartarna á Mýruni

Id	Opgavetil	Opgavenavn	Varighed	Startdato	Slutdato
1		**Sambýli til fólk við menningartarni - Mýran**	**1080 dage**	**ti 06.03.18**	**fr 19.08.22**
2		**Byggiskrá**	**59 dage**	**ti 06.03.18**	**fr 25.05.18**
3		Fundarvirksemi og orðing	59 dage	ti 06.03.18	fr 25.05.18
4		Handan av byggiskrá	1 dag	ti 06.03.18	ti 06.03.18
5		**Ráðgeving/projektering**	**718 dage**	**ti 06.03.18**	**fr 15.01.21**
6		**Útboð - Ráðgeving**	**70 dage**	**ti 06.03.18**	**ma 11.06.18**
7		Útbjóðing heildarráðgeving - undangóðkenning	16 dage	ti 06.03.18	ti 27.03.18
8		Avlevering	0 dage	ti 06.03.18	ti 06.03.18
9		Døming av undangóðkenning	10 dage	on 28.03.18	ti 10.04.18
10		Kunningarskriv til fyritøkur	1 dag	on 11.04.18	on 11.04.18
11		Útbjóðing heildarráðgeving - alment útboð við undangóðkenning	21 dage	to 12.04.18	to 10.05.18
12		Avlevering	0 dage	ti 06.03.18	ti 06.03.18
13		Døming av innkomnum tilboðum	10 dage	fr 11.05.18	to 24.05.18
14		Sáttmálasamráðingar	12 dage	fr 25.05.18	ma 11.06.18
15		**Skipanaruppskot**	**72 dage**	**ti 12.06.18**	**on 19.09.18**
16		Skipanaruppskot	67 dage	ti 12.06.18	on 12.09.18
17		Gransking av skipanaruppskoti	5 dage	to 13.09.18	on 19.09.18
18		**Projektuppskot**	**45 dage**	**ma 18.05.20**	**fr 17.07.20**
19		Projektuppskot	40 dage	ma 18.05.20	fr 10.07.20
20		Útbjóðingartilfar til jørðarbeiðið	40 dage	ma 18.05.20	fr 10.07.20
21		Gransking av prosjektuppskoti	5 dage	ma 13.07.20	fr 17.07.20
22		**Figgjarmálaráðið til viðgerðar**	40 dage	ti 18.08.20	ma 12.10.20
23		**Mynduleikaprojekt**	**37 dage**	**ti 18.08.20**	**on 07.10.20**
24		Mynduleikaprojekt	15 dage	ti 18.08.20	ma 07.09.20
25		Mynduleikaviðgerð	22 dage	ti 08.09.20	on 07.10.20
26		**Høvuðsprojekt**	**55 dage**	**ti 08.09.20**	**ma 23.11.20**
27		Høvuðsprojekt	35 dage	ti 08.09.20	ma 26.10.20
28		Gransking av høvuðsprojekti	20 dage	ti 27.10.20	ma 23.11.20
29		**Útboð - Jørðarbeiðið**	**17 dage**	**ti 18.08.20**	**on 09.09.20**
30		Útboð	1 dag	ti 18.08.20	ti 18.08.20
31		Licitatión	15 dage	on 19.08.20	ti 08.09.20
32		Sáttmáli	1 dag	on 09.09.20	on 09.09.20
33		**jørðarbeiðið**	**82 dage**	**to 10.09.20**	**fr 15.01.21**
34		uppstartur	1 dag	to 10.09.20	to 10.09.20
35		Grovplanering	80 dage	fr 11.09.20	to 14.01.21
36		Avhanda jørðarbeiðið	1 dag	fr 15.01.21	fr 15.01.21
37		**Útboð - Høvuðsarbeiðstøka**	**66 dage**	**ti 24.11.20**	**ti 09.03.21**
38		Klárgerð av útbjóðingartilfari	10 dage	ti 24.11.20	ma 07.12.20
39		Útboð	21 dage	ti 08.12.20	ti 19.01.21
40		Licitatión	0 dage	ti 19.01.21	ti 19.01.21
41		Gransking av tilboðum	10 dage	on 20.01.21	ti 02.02.21
42		Sáttmálasamráðingar	10 dage	on 03.02.21	ti 16.02.21
43		prosjektgjøgnumgongd	15 dage	on 17.02.21	ti 09.03.21
44		**Innbúgv og tól**	**328 dage**	**ti 08.09.20**	**ma 07.02.22**
45		Prosjetering innbúgv og tól	35 dage	ti 08.09.20	ma 26.10.20
46		Útboð innbúgv og tól	20 dage	ti 04.01.22	ma 31.01.22
47		Lisitatión innbúgv og tól	1 dag	ma 07.02.22	ma 07.02.22
48		**Bygging**	**282 dage**	**ma 26.04.21**	**to 07.07.22**
49		Uppstartur	1 dag	ma 26.04.21	ma 26.04.21
50		Bygging	280 dage	ti 27.04.21	on 06.07.22
51		Avlevering	1 dag	to 07.07.22	to 07.07.22
52		Mangulgjøgnumgongd	10 dage	fr 08.07.22	fr 19.08.22



6.0 KOSTNAÐUR

6.1 Háttalag (metoda)
6.2 Kostnaðarstøði
6.3 Útboð
6.4 Kostnaður

6.3 ÚTBOÐ

Tað hevur í longri tíð verið ein yvirvág av útboðum í høvuðsarbeiðstøku. Tað er eitt avmarkað tal á fyritøkum, sum halda seg til at taka ein størri vága enn tann, sum fyritøkan hevur sum kjarnuøki. Kappingin er merkt av at høvuðsarbeiðstakararnir eru ov fáir:
Mett verður, at um samlaða arbeiðið verður býtt upp í fleiri arbeiðstøkur, so verður kappingin eisini størri og harvið, eisini bíligari. Tað er heilt vanligt at bjóða jørðarbeiðið út fyri seg, so tað arbeiðið kann koma í gongd beinanvegin og kann verða liðugt tá avtala um byggiarbeiðini er undirskrivað. Tað er heldur ikki óvanligt at innleggingarnar (HVS, ventilatión og el) verða bjóðaðar út fyri seg. Mælt verður til, at bjóðað arbeiðið í fylgjandi arbeiðstøkur:

1. Jørð- og kloakkarbeiði
2. Lendis-, betong-, stál-, timbur- snikkara-, múrara-, mála og gólvarbeiði
3. HVS, ventilatión og CTS
4. El arbeiði

6.3 KOSTNAÐUR

Uppskotið er prísmett út frá kostnaði av bygningslutum. Hetta verður gjørt fyri at tryggja at framhaldandi projekteringin er í tráð við kostnaðarkarmin.

Samlaðu hondverkaraútreiðslurnar fyri byggingina verða mettar at verða kr 27.275.745, svarandi til ein fermetrakostnað uppá 22,2 tús/m2

6.0 KOSTNAÐUR

6.1 Háttalag (metoda)
6.2 Kostnaðarstøði
6.3 Útboð
6.4 Kostnaður

0	Byggiplass	3.334.000
1	Jørðarbeiði	1.365.970
2	Lendisarbeiði	1.338.070
3	Kloakkarbeiði	1.302.398
4	Betong	1.024.800
5	Timburarbeiði	9.630.618
6	Gólvarbeiði	843.902
7	Múraraarbeiði	185.136
8	Málaraarbeiði	525.552
9	HVS arbeiði	2.631.878
10	Felagskøkur	238.814
11	Ventilatiónsarbeiði	1.637.230
12	Automatikkarbeiði	335.817
13	Elarbeiði	2.658.960
14	Skúrar	212.600
	Hondverkaraútreiðslur tilsamans	27.275.745

Óvissan er 4%

7.0 VANGAMYND





Málningurin sum er nýttur til kápumynd á Skipanaruppskotinum, er málaður av Jón Poulsen.

Jón Poulsen er føddur 1955 og er autodidaktur listamaður.